# Føroyar skulu sjálvar vilja loysing

**Um ríkisfelagsskapin sigur Lars Løkke Rasmussen, at hann sjálvandi ynskir at halda fast um ríkisfelagsskapin. - Tað hevur svigermamman ikki fingið talað meg frá enn, segði Lars Løkke Rasmussen við Rás2 leygarkvøldið**

HVONN LIVE
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Lars Løkke Rasmussen, forsetisráðharri og maður Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, sigur, at føroyskar kvinnur eru flottar og tolnar*

Fyri Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, hevur føroyska sambandið nógvar ymiskar dimensiónir.

- Sólrun kemur úr einari sjálvsstýrissinnaðari familju, og abbi hennara, Sigurd Joensen, tosaði ikki við meg tey fyrstu nógvu árini. Men so líðandi funnu vit útav tí, sigur Lars Løkke Rasmussen við Rás2 leygarkvøldið.

- Tað er ein familja, sum fer væl um tey gomlu føroysku virðini, sigur Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, við Rás2 leygarkvøldið.

## Hittust á kollegiu

Flestu vita vit, at Lars Løkke Rasmussen hevur føroyska konu. Men hvussu hittust tey?

- Vit møttust á einum kollegiu í Keypmannahavn. Hon búði viðsíðunaav hjá einum, sum æt Kaj. Eg var so har úti einaferð eitt kvøldið, og har møttust vit. Og so gekk eg út har í umleið eitt ár, og bankaði uppá av og á. Og so at enda, so læt hon upp. Og so fór eg inn, og eg kom ongantíð útaftur, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Sólrun stuðlar uppundir søguna, men heldur tó ikki, at tað mundi ganga eitt heilt ár, áðrenn hon lat upp.

- Men hann bankaði nakrar ferðirnar, sigur Sólrun.

- Føroyskar kvinnur eru ótrúligar flottar. Tað er mín kona eisini. Og tær eru eisini ótrúliga tolnar, greiðir Lars Løkke Rasmussen frá.

## Tungur arvur at lyfta

Sjálvur heldur Lars Løkke Rasmussen, at tað hevur verið gott at verið forsætisráðharri teir seinastu níggju mánaðirnar. Men tað hevur verið ein tungur arvur at lyfta eftir Anders Fogh Rasmussen.

- Men nú var tað soleiðis, at undangongumaðurin timeaði tað væl við at fara frá, við at tá hann fór frá, kom ein figgjarkreppa. Men tað hevur verið gott, haldi eg, sigur Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri.

- Hetta hevur verið ein strævin og men eisini spennandi tíð, serliga nú seinastu vikuna, nú vit hava fingið eina meira ella minni nýggja stjórn og hava lagt fram visjónina Danmark 2020, heldur Lars Løkke Rasmussen.

Um ríkisfelagsskapin segði Lars Løkke Rasmussen, at hann sjálvandi ynskir at halda fast um ríkisfelagsskapin.

- Tað hevur svigermamman ikki fingið talað meg frá enn, staðfestir forsætisráðharrin.

Sjálvur sigur hann, at hann sjálvandi ikki vil stilla seg fyri dyrnar hjá føroyingum, um teir ynskja at loysa.

- Men tað eigur at koma frá føroyingum sjálvum, sigur hann.

# Vit ætlaðu bara at fáa Sólrun

**Eyðun Klakstein, redaktørur á Hvonn Live, greiðir frá, at ætlanin var at fáa Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen við, og tá hon játtaði, so bar brádliga eisini til at fáa danska forsetisráðharran við. – Vit vóru alla tíð bangin fyri, at okkurt fór at koma í vegin, sigur Eyðun Klakstein**

HVONN LIVE
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð gjørdi ein danskur forsetisráðharri ein túr til Føroyar fyri at vitja ein føroyskan fjølmiðil, tá Lars Løkke Rasmussen, saman við konu síni, føroysku Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen vitjaði sendingina Hvonn Live hjá Rás2.

Eyðun Klakstein, redaktørur á sendingini, staðfestir, at hetta var ein forkunnug vitjan og at tað var Sórun Jákupsdóttir Rasmussen, sum var orsøkin til, at tey bæði vitjaðu í Føroyum.

– Vit spurdu seint í fjør Sólrun, um hon vildi vera við í sendingini. Tað vildi hon fegin, og so eydnaðist tað eisini at fáa Lars Løkke Rasmussen við, greiðir Eyðun Klakstein frá.

Hann leggur afturat, at áhugin kom av, at Sólrun Rasmussen er føroysk.

## Nógv kundi kiksa

Men Eyðun Klakstein viðurkennir eisini, at hann var bangin fyri, at tað kanska ikki fór at eydnast at fáa hjúnini við í sendingina.

– Vit vóru alla tíð bangin fyri, at okkurt fór at koma í vegin. Serliga av rokaduni av ministarunum og túrurin, sum tey gjørdu til Tenerife í vetrarfrítíðini, har tey blivu nógv skeldað eisini, sigur Eyðun Klakstein

## Vildu svara øllum

Tað er nógv sum skal koma upp á pláss, tá ein forsetisráðharri skal við í eina tílíka sending, men Eyðun Klakstein staðfestir, at hjúnini ikki løgdu nakra forðing á, hvat tey vildu svara uppá. Og spurningarnir, sum vórðu settir vóru eitt bland av gaman og álvara.

– Tað er eitt talkshow, sum tey eru komin við til og tí verður tað ikki eitt øgiliga krittiskt, politiskt interview, sigur Eyðun Klakstein.

Hann sigur somuleiðis, at tey vildu hava nakrar krittiskar spurningar við eisini, og hesum svaraði Lars Løkke Rasmussen eisini stuttligt uppá.

– Vit royndu at vekta tað soleiðis, at tað ikki bleiv tað reina fjas. Tað roynir mann við tí erfaringini mann hevur.

## Ikki tey seinastu

Hvonn Live hevur havt fleiri kendar útlendskar gestir, og Eyðun Klakstein staðfestir, at hjúnini Rasmussen ikki verða seinastu útlendsku gestirnir.

– Beinanvegin í konseptinum gjørdu vit av, at tað skuldi vera okkurt serligt, og tað er ikki vanligt, at føroyskar útvarpssendingar fáa kendar útlendingar heim. Tann leistin fara vit at halda fast við, og vit hava onkrar hálvar avtalur til komandi sendingar, sigur Eyðun Klakstein.



*Eyðun Klakstein, redaktørur á Hvonn Live, staðfestir, at Lars Løkke Rasmussen ikki verður seinasti útlendingurin í sendingini*